# Undirgrundin yvirtikin í dag

*-Ein stórur og góður dagur sigur Atli Dam, løgmaður*

Í dag klokkan 10 verður undirgrundaravtalan millum Danmark og Føroyar undirskrivað í Tinganesi. Tað verða danski forsætismálaráðharrin Poul Schlüter og Atli Dam, løgmaður, sum fara at undirskriva avtaluna, sum letur føroyingum allan rætt til undirgrundina.

Tað var á einum fundi fyrr í Keypmannahavn í heyst, at danska stjórnin kúvendi í undirgrundarspurninginum og segði frá, at hon nú varð sinnað at ganga føroyska ynskinum um yvirtøku á møti.

Í sambandi við undirskrivingina sjey fólk komin úr Danmark. Umframt forsætisráðharrin Peter Wiese, deildarstjóri, Gunnar Martens, skrivstovustjóri, Jørgen Nørgaard, deildarleiðari, Inger Skydsgaard, fulltrúi, Adam Wolf, ráðharraskrivari og Monica Baruah, skrivstovufulltrúi. Hetta er í stóran mun tey fólk, sum hava verið við í samráðingunum um undirgrundina.



*Atli Dam og Poul Schlüter skulu í dag undirskriva undirgrundaravtaluna*

Atli Dam, løgmaður sigur í eini viðmerking til vitjanina, at hetta er ein stórur dagur í føroyskari søgu. Við hesi undirskriving er eitt sera stórt ynski hjá Føroya Løgtingi og Føroya fólki gingið á møti og hann vónar, at henda avtalan fer at verða báðum pørtum at gagni.

Uppá fyrispurning um aðrar samráðingar verða, nú danski forsætisráðharrin vitjar, sigur løgmaður, at ongar almenna samráðingar eru avtalaðar, nakað annað er, hvat stundir verða at tosa um.

Atli Dam sigur víðari, at orsøkin til at Schlüter sjálvur kemur til Føroya at skriva undir avtaluna er tann, at landsstýrið hevur lagt stóran dent á hesa avtalu og at hon eisini varð undirskrivað í Føroyum. Hetta helt hann vera eitt sera gott hugskot sigur løgmaður.

-Eg eri sera nøgvur við, at henda avtalan nú verður undirskrivað sigur løgmaður og leggur aftrat, at tað, sum er komið fram um, at danir skulu vera við til at fáa arbeiði í sambandi við møguliga oljuvinnu, so er talan um eina sokallaða "hensigtserklæring" frá landsstýrinum um, at føroyingar eru takksamir fyri at vit kunnu brúka danska eksperstisu í útbygginini av eini møguligari oljuvinnu.

Vit prenta í blaðnum í dag eisini sjálvt orðaljóðið í tí avtalu, sum verður undirskrivað í dag.

**jan**

## Aftale mellem Danmarks regering og Færøernes Landsstyre om råstoffer i undergrunden

1. Med hjemmel i lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre paragr. 3, jfr. liste Bc pkt. 3, overføres sagsområdet »råstoffer i undergrunden« til færøsk særanliggende.
2. I medfør af hjemmestyrelovens paragr. 4 overtager hjemmestyret den lovgivende og administrative myndighed på området.
3. I overensstemmelse med hjemmestyrelovens paragr. 2 overtager hjemmestyret de med sagsområdet forbundne udgifter.
4. I overensstemmelse med hjemmestyrelovens paragr. 5 er hjemmestyrets kompetence undergivet de begrænsninger, der følger af rigets internationale forpliktelser.
5. Nærmere aftale inden for rammerne af nærværende aftale, i forbindelse med at sagsområdet overføres til færøsk særanliggende, træffes mellem Færøernes landsstyre og de pågældende ressortministerier.
6. Eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding vil udløse forhandlinger om nedsættelse af statens tilskud til Færøerne.

Regeringen har konstateret, at Færøernes landsstyre er indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser – forudsat konkurrencedygtighed – at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvikling.

Tórshavn, den 1992

| | |
|---|---|
| For Statministeriet | For Færøernes landsstyre |
| Poul Schlüter / | Atli P. Dam / |

**B68-CUP 1993**

**Innandurakapping í Fótbólti**

verður fyri mannfólk í ÍTRÓTTARHØLLINI Í RUNAVÍK vikuskiftið 2.–3. januar

Umframt heiðursmerki, fáa trý tey bestu liðini hesar vinningar
nr. 1 kr. 1.500,-
nr. 2 kr. 1.000,-
nr. 3 kr. 500,-

Seinasta freist at melda til er týsdagin 29.12.92. Hetta kann gerast á tlf. 48748, 47691 og 48202.

Luttøkugjaldið fyri hvørt liðið er kr. 300,-.

B68

STRANDFARASKIP LANDSINS TÓRSHAVN

**Suðuroyarleiðin TEISTIN um jólini og á nýggjárinum**

| | |
|---|---|
| Jólaaftan: | Drelnes-Tórshavn kl.07.30 |
| | Tórshavn-Drelnes kl. 15.00 |
| Jóladag: | Eingin sigling |
| 2. jóladag: | Drelnes-Tórshavn kl. 07.30 |
| | Tórshavn-Drelnes kl. 21.00 |
| Nýggjársaftan: | Sum jólaaftan |
| Nýggjársdag: | Sum 2. jóladag |

Bygdaleiðir í Suðuroy koyra í sambandi við nevndu túrar hjá Teistanum.

STRANDFERÐSLAN

**B68-CUP 1993**

**Innandurakapping í Fótbólti**

verður fyri tær yngru deildirnar í ÍTRÓTTARHØLLINI Í RUNAVÍK vikuskiftið 9.–10. januar

**Aldursbólkar:**

| | |
|---|---|
| Dreingir árg. 77-78 | Dreingir árg. 83-86 |
| Dreingir árg. 79-80 | Gentur árg. 79-80 |
| Dreingir árg. 81-82 | Gentur árg. 81-82 |

Meldast kann til á hesum tlf. nr.: 48379 – 48283 – 48056 innan 5. januar 1993.

Luttøkugjaldið er kr. 150,- fyri liðið.

B68